AGANEVNDIN

KÆRA 7/2013

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: B68 kærir AB fyri brúk av ólógligum útlendskum leikara** | |
| Deild: Effo-deildin | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 27.06.2014 | Aganevndin móttikið kæru: 15. Juli 2014 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: - | Starvsnevndin biðin um ummæli: - |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: - |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna, Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.

**Úrskurður**

Aganevndin hevur viðgjørt kæruna frá B68, har kært verður um, at AB í dysti í Effo-deildini 27. juni 2014 hevur gjørt brúk av útlendskum leikara, sum ikki hevur arbeiðsloyvi í Føroyum. Aganevndin hevur, vísandi til grein 20, stk. 1, 2. pkt. í kappingarreglunum fyri fótbólt, tikið avgerð um at burturvísa málinum.

Aganevndin staðfestir, at sambært grein 20, stk. 1, 2. pkt., kemur útlendskur leikari, sum í 3 samanhangandi kappingarár hevur havt spæliloyvi at leika í Føroyum, ikki undir reglurnar um útlendskar leikarar í grein 19 í kappingarreglunum fyri fótbólt og verður málið tí burturvíst.

Aganevndin kann at enda viðmerkja, at av tí at útlendski leikarin í hesum føri kemur undir undantaksreglurnar í grein 20, stk. 1, 2. pkt., so kann nevndin ikki beinleiðis taka støðu til uppáhaldini frá B68 um, at grein 19 skal vera brotin. Hinvegin, so loyvir Aganevndin sær at sáa iva um, hvørt grein 19 og 20 í kappingarreglunum fyri fótbólt eru í fullum samsvari við reglurnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi á útlendingaøkinum í sivilrættarligu lóggávuni.

**10. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 23. juli 2014**

Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna